gult cyan magenta svart



# Føroyar eru ein lítil loynidómur

*Yaacov Bergman, ið ferðast kring heimin sum dirigentur, var fyri tveimum árum síðani í Føroyum og stjórnaði Requiem hjá Verdi. Hann gjørdist sera hugtikin av Føroyum og fólkinum og nú er hann aftur á vitjan hjá Atlantsljómi og skal stjórna stórverkinum Requiem hjá Brahms*

DAGFINN OLSEN

Á King's Suite á Sjómansheiminum í Havn situr Yaacov Bergman. Útsýnið oman í aldingarðin við Gamla Bókhandil, Havnar Kirkju og Vágsbotn er einastandandi vakurt í góðveðrinum og tað fegnast hann um, tí hann er vanur at hava myndatól við sær og taka myndir av útsýninum úr kamarsvindeyganum á gistingarhúsinum, har hann heldur til. Og hann ferðast víða. Maestro Bergman er nevniliga ikki ein og hvør.

Hann er føddur í Ísrael og býr nú í New York. Hann ferðast kring heimin og stjórnar orkestrum kring allan heim. At nevna allan listan við framførslum, heiðursteknum og útbúgvingarstøðum hevði verið ov nógv avgjørt á hesum stað. Men lat okkum staðfesta, at hann m.a. hevur verið í læru hjá Leonard Bernstein og Vladimir Kin, umframt á ymsum hægri lærustovnum. Hann er giftur Joan Behrens Bergman, ið er klaverleikari. Hann ferðast kring heimin og er kendur víða, sum dugnaligur dirigentur.

## Vitjar aftur

Fyri tveimum árum síðani eydnaðist at fáa Yaacov Bergman til Føroya at stjórna Requiem hjá Verdi. Og hann gjørdist sera hugtikin av landinum og fólkinum, ið her býr.

– Slíkt sær og upplivir ein ikki í Amerika og heldur ikki aðrastaðni í heiminum, sigur Bergman, ið sigur, at land og fólk eigur sín lut í, at hann so fegin vil vitja aftur til Føroya.

Hann er hugtikin av fólkinum og trivnaðinum her. Hann minnir á, at tónleikur og náttúra er ein sterkur frymil ella formul, og tí heldur hann, at hetta má vera eitt stað, har nógvur tónleikur sær dagsins ljós.

## Festivalir hava týdning

Yaacov Bergman vísir á, at tað hevur alstóran týdning, at tónleikafstivalar eru. Størri týdning, enn mong geva sær far um.

Samfelagsliga hevur tað týdning og kann eisini fáa búskaparligan týdning, um festivalurin gerst kendur. Men eisini fyri íbúgvar, gestir og trivnaðin sum heild, hava festivalar sum Atlantsljómur/Summartónar týdning.

– Tónleikafagnaðir siga nakað um lívskvalitetin á staðnum. Tað hevur týdning fyri, um fólk dragast at staðnum. Um læknar og onnur tíma at búðsetast og so framvegis, sigur Yaacov Bergman.

Hann vísir eisini á, at mangir stórir tónleikafagnaðir eru í sera lítlum plássum. Kanska gerast tey kend av hesum.

Bergman vísir á, at nú olja er aktuell í Føroyum, so er hetta bert pengar, men tað hevur týdning at minnast til sálarliga trivnaðin. Føroyar eru eitt paradís fyri listafjepparar og tað, at vit eru so avbyrgd, er partur av hesum. Hóast heimurin í dag gerst alsamt minni, so er tað so, at fólk vilja út í krókarnar at ferðast. Og slíkt, sum mentan og tónleikur er gótt fyri t.d. ferðavinnuna.

– Og so skal ein minnast til, at fólk, sum hava ferðast her, eru umboðsmenn fyri landið.

– Eg eigi nøkur vinfólk, sum fyri kortum fingu teldu og internet. Tað fyrsta, tey leitaðu seg inn á, var Atlantsljóm/Summartónar og Føroyar, sigur Bergman, ið eisini vísir á, at í New York Times hvønn leygardag er ein lítil teigur, ið nevnir júst slík smá mentanartiltøk, sum Atlantsljóm.

– Stuttligt er eisini, at eg mundi havt eitt kór uppá 90 sangarar úr Colerado við mær til Føroya, men tað eydnaðist ikki at fáa hetta at hanga saman fíggjarliga, sigur Bergman, sum hevur ein dreym um, at tað eisini skal bera til at fáa teir mongu serkønu sangararnar og tónleikararnar, ið vitja við slíkt tiltak sum Atlantsljóm, at geva frálæru og hava skeið.

## Føroyar ein loynidómur

– Tað eru ikki mong, ið kenna til Føroyar. Føroyar eru sum ein lítil loynidómur. Og her er annað, enn bert tónleikurin. Náttúran, fjøllini, vatnið og fólkini. Rátt og sera góður íblástur til alla list, heldur Yaacov Bergman, ið ikki dylir, at tað eisini er hann sjálvur, ið hevur strongt á fyri at koma aftur til Føroyar.

Og Yaacov Bergman er ikki bangin at fara undir eitt stórverk sum Requiem eftir Brahms, nú hann skal starvast í Føroyum. Hann veit, hvat hann kemur til og hann er vanur at arbeiða við bæði serkønum og dugnaligum leikfólki.

- Eg kenni eitt sindur til kórini og eldsálirnar aftanfyri Atlantsljóm/Summartónar, sigur Bergman og nevnir t.d. Ólav Hátún.

Og Bergman himprast als ikki at fara undir stórverkið eftir Brahms.

- Longu tá vit vóru á veg til flogvøllin í Vágum fyri tveimum árum síðani, gjørdu Ólavur og eg av at fara undir Requiem hjá Brahms. Tað skuldu so ganga tvey ár, til tað eydnaðist at savna allar snøklar, so tað kundi eydnast, sigur Bergman og minnir á øll tey fólkini, ið leggja lív á sál í hetta megnar tiltak og sum sita við telduna í tímavís og senda teldupost.

- Eisini Norðurlandahúsið er ein perla. Bæði tá umræður ljóð og snið, sigur Bergman og hyggur út ígjøgnum vindeygað í King's Suite á Sjómansheiminum, har sólin, sjógvurin, fjøllini og fólkini og lívið bíða eftir honum. Alt, ið hann metir sum en lítlan loynidóm, sum fleiri áttu at fingið innlit í.

Longu í gjárkvøldið byrjaðu venjingarnar til Requiem há Brahms, har Maestro Bergman skal leiða orkestur og sangarar, men íbúgvararnir í loynidóminum í Atlantshavi mugu skunda sær til atgongumerkjalúkurnar, tí tað er eingin loyna, at avmarkað atgongd er til tær báðar framførslurnar av Requiem hjá Brahms í Norðurlandahúsinum.



*Á King's Suite á Sjómansheiminum í Havn situr Maestro Bergman. Hann er hugtikin av landinum og fólkinum og dylir ikki, at hann sjálvur strongdi á fyri at vitja aftur í Føroyum, eftir vitjanina fyri tveimum árum síðani*
**Mynd: Dagfinn Olsen**



*– Tað eru ikki mong, ið kenna til Føroyar. Føroyar eru sum ein lítil loynidómur. Og her er annað, enn bert tónleikurin. Náttúran, fjøllini, vatnið og fólkini. Rátt og sera góður íblástur til alla list, heldur Yaacov Bergman*
**Mynd: Dagfinn Olsen**



*- Eg kenni eitt sindur til kórini og eldsálirnar aftanfyri Atlantsljóm/Summartónar, sigur Bergman, ið her er avmyndaður saman við tveimum av fyrireikarunum av Atlantsljómi, Karin Kass og Urd Johannesen*
**Mynd: Dagfinn Olsen**

gult cyan magenta svart



Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

fk Matseðilin
Hósdagin 29. juni:
Karbonadir
Fríggjadagin 30. juni:
Svínakambur
Leygardagin 1. juli:
Enskur búffur
Mánadagin 3. juli:
Kjøtfrikadellir
Týsdagin 4. juli:
Fiskafrikadellir
Mikudagin 5. juli:
Hamburgarryggur
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
www.marcopolo.fo
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 17[00] – 23[30]
Fríggjadag kl. 17[00] – 03[30]
Leygardag kl. 17[00] – 03[30]
Sunnudag kl. 17[00] – 23[30]

Kaggin
Fríggja-og leygarkvøldið spælir
ÓLAVUR ØSTER BAND
Leygardagin verður BINGO frá kl. 16.00
Køkurin er opin
fríggjakvøldið kl. 18.00-22.30
leygarkvøldið kl. 20.00-22.30
Semifinalurnar verða vístar á stórskíggja
Kaggin Kaggin Kaggin
Sosialurin - 311820
www.kaggin.fo

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spæla
Mr. Jolli's Fluffy Toys
Sosialurin - 311820

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Diskotek verður leygarkvøldið 1. juli.
Martin vendir plátum!
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Vilja tygum vi› í
**Í b‡in** - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur

DAGFØR TEG HALT
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin **ókeypis** restina av hesum ársfjórðinginum
sosialurin
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

| |
|---|
| Navn: |
| Búst.: |
| Postnr., bygd, býur: |
| Tlf.: |
| Undirskrift: |

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.